DAGSINS MEINING

Eigaraviðurskfti í fiskivinnuni á landi

Eitt álit um eigaraviðurskiftini í fiskivinnuni á landi var herfyri handað landstýrismanninum í vinnumálum. Ein av niðurstøðunum var, at vit ikki skulu ræðast útlendskan kapital í føroyskari fiskiframleiðslu.

Hetta er ivaleyst rætt, um man gongur útfrá, at málið við slíkari framleiðslu í Føroyum er so gott úrslti sum møguligt fyri tað virkið, ið man eigur í Føroyum. Soleiðis nýtist tað ikki altid at vera. Man kan fara so langt, sum at siga, at tað er ikki sørt naivt, at ganga útfrá, at profitmaksimering fyri fiskaframleiðsluna í Føroyum er motivið, um ein stór altjóða fyritøka keypti til dømis Fiskavirking. Tað eru nógv dømi um fyritøkur, ið hava alla ta framleiðsluorku, teimum tørvar á europeiska meginlandinum. Slíkar fyritøkur keypa ikki føroysk virkir, tí teimum manglar framleiðsluorku ella know-how, slíkar fyritøkur keypa, tí teimum manglar atgongd til råvøru og hálvfabrikata.

Vit siga ikki, at tað í øllum førum er so, men ein vandi kann tað verða. Skuldi tað hent, at onkur fyritøka keypti stóran part av føroysku framleiðsluorkuni fyri at veita råvøru og hálvfabriakata til virki síni á meginlandinum, so hevði hetta verið einki minni enn ein vanlukka fyri Føroyska fiskivinnu.

Ein gyltur millumvegur má finnast. Tað er neyvan rætt heilt at halda útlendskan kapital úti av føroyskari fiskaframleiðslu, men tað má sigast at verða óguvliga naivt at halda, at motivini hjá útlendskum fyritøkum til at keypa í øllum førum er tann mest gevandi raksturin fyri ta, í heildini, lítlu eindina, ið liggur í Føroyum.

Nógv av tí nýliberalistiska rákinum, ið floymir yvir landið í hesum døgum, skyldast reint bláoygni og væntandi vinnuroyndir. Tað er í nógvum førum gott, at marknaðurin avgerð, hvussu ein vinna sær út, men vit eiga at gera okkum greitt, at í summum vinnum er ikki vist, at marknaðarkreftirnar tryggja, at framkomin framleiðsla yvirhøvur er í Føroyum. Tá gerst tað eitt politskst problem, ið partvíst kann loysast við protektionismu.

Protektionisma er eitt banniorð millum nógvar búskaparfrøðingar, og er í nógvum førum skaðilig, men í summum førum er hon neyðug fyri eitt samfelag sum tað føroyska. Hetta hava allir flokkar í føroyskum politikki ásannað í nogv ár, og kunnu vit nevna nógv dømi um slíka protektionismu, eitt nú í føroyskari oljulóggávu.

Aftur her: Alt við máta. Heimurin er ikki svartur og hvítur. Sum oftast er hann millum ljósagrátt og myrkagrátt.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Lesararnir sleptir upp á fjall

Ólavur Waag Høgnesen

Ein høvuðsuppgáva hjá fjølmiðlunum skuldi helst verið at upplýsa borgararnar, so vit vera betri fyri at taka støðu til dagsins mál. Mangan eru vit tó verri fyri, tá ið eitt mál hevur verið gjøgnum journalistisku mylluna her á landi.

Í vikuni varð kunngjørt, hvør verður landsantikvarur. Tá ið almenn størv skulu setast, so hevur setanarmyndugleikin skyldu at seta tann best egnaða í starvið. Tað serliga við hesi setanini er, at setanarnevndin tvær ferðir hevur innstillað ein ávísan umsøkjara, men kortini hevur landsstýrismaðurin sett ein annan umsøkjara.

Tað er eitt sera álvarsligt stig! Tí er tað rætt, sum fleiri hava fført fram, at landsstýrismaðurin skal hava sera góðar grundir fyri síni avgerð.

Nú veit eg av góðum grundum einki um málið, men tann, sum einki veit, veit í hvussu er so mikið:

1. Hevur setanarnevndin peikað á tann best kvalifiseraða umsøkjaran, so hevur landsstýrismaðurin ein álvarsligan trupulleika; løgmaður má so taka tey neyðugu stigini í málinum
2. Hevur setanarnevndin ikki peikað á tann best egnaða umsøkjaran og hevur landsstýrismaðurin grein í sínum máli, so hevur embætisverkið (og harvið tær almennu Føroyar) ein álvarsligan trupulleika; landsstýrismaðurin má tá taka tey neyðugu stigini

Mikukvøldið keypti eg bæði Dimmalætting og Sosialin, men í báðum førum verða lesararnir sleptir uppá fjall. At landsstýrismaðurin hevur gjørt nakað skeivt, kann bara vera tilfeldið, um setanarbólkurin hevur gjørt sítt arbeiði til lítar og peikað á tann best egnaða. Og tað letur til, at bæði bløðini byggja á ta fortreyt, at setanarbólkurin hevur gjørt sítt arbeiði til lítar. T.v.s., at møguleiki 2 omanfyri verður als ikki umrøddur. Er tað so, at setanarbólkurin ikki hevur peikað á tann best egnaða umsøkjaran, *so hava vit eina heilt aðra søgu.*

Nú kann tað verða, at bløðini vita fyri vist, at setanarnevndin hevur gjørt sítt arbeiði til lítar (tað mugu vit vóna, tí tað er avgerandi fyri trúvirðið í almenna starvssetanarpolitikkinum); so áttu bløðini at latið okkum vita tað. Hinvegin, hava bløðini *ikki* holla vitan um hetta, so er journalistiska arbeiðið ikki hálvgjørt.

Sjálvandi eiga landsins borgarar at taka fyri givið, at ein bólkur av sakkønum einans hevur saklig atlit í slíkari viðgerð. Men ikki pressan ... í einum slíkum føri eigur hon at varpa ljós á allar hugsandi møguleikar.

Sum málið nú er umrøtt, so eru vit verri upplýst, enn áðrenn vit lósu bløðini: Antin kunnu vit velja at trúgva tí, sum bæði bløðini hava blást upp sum ein veruleika; ella kunnu vit siga, at málið er ikki fulllýst, og tí vita vit einki, sum kann hjálpa okkum at hava eina meining um málið.

Málið um landsantikvarin

Hvørki starvsfólkapolitikkur ella aðrar reglur eru brotnar
-heiti á einstaklingar ella fakfeløg um at fara til Løgtingsins Umboðsmann

TÍÐINDASKRIV

Í fjølmiðlunum og á tingsins røðarapalli havi eg í dag hoyrt tíðindafólk og Løgmann leggja undirriðaðu undir at hava brotið almenna starvsfólkapolitikkin í sambandi við setanina av landsantikvari. Hartil verður róð fram undir, at talan er um eina politiska setan.

Hetta vil eg ikki hava sitandi á mær. Eg undrist stórliga á, at slíkt verður fført fram, uttan at Løgmaður hevur kannað málið ella vísir á, hvar almenni setanarpolitikkurin er brotin, ella hvørjar grundgevingar eru skeivar í málinum.

Tí skal eg sláa fast:

- Avgerðin um at seta starvið sum landsantikvarur er tikin út frá sakligum og grundgivnum fortreytum – nevniliga út frá metingini av kvalifikasjónum hjá umsøkjarunum. Hesar grundgevingar kunnu allar eftirkannast í málinum.
- Í hesum ítøkiliga máli, havi eg eisini spurt meg fyri á Løgmansskrivstovuni um mannagongdir í sambandi við setanina.
- Undirritaða hevur fylgt mannagongdunum í setanarpolitikkinum.

Sum landsstýrismaður kann eg ikki lýsa alt málið í almenninginum, tí eins og onnur í fyrisitingini havi eg tagnarskyldu. Men fleiri møguleikar eru hjá bæði teimum persónum, sum eru partar í málinum, hjá Løgmanni og hjá øðrum at fáa lýst, hvat veruliga er farið fram í málinum.

Tí eri eg fegin um, at ætlanin er at kæra málið til Løgtingsins Umboðsmann, har málið kann lýsast av óheftum. Og eg heiti á einstaklingar ella fakfeløg teirra um at leggja málið fyri Umboðsmannin.

Eg taki fulla ábyrgd av gongdini og avgerðunum í hesum máli, og tað tykir mær rangvørt, at niðurstøður verða gjørdar, áðrenn nakar hevur sett seg inn í málsgongdina.

At samanberingar verða gjørdar við onnur mál, har bæði landsstýrismannanevnd og kanningarstjórar hava lýst málini og gjørt sínar niðurstøður, sigur mær rættiliga greitt, at alt annað enn sjálvt málið verður viðgjørt í løtuni.

Tórshavn, 6. februar 2003

Annlis Bjarkhamar
landsstýrismaður

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Óli Breckmann broytti søguliga veruleikan

Jóannes Eidesgaard

Um tað var so, at Óli Breckmann ikki visti betur, so var tað sín søk, at hann við fríum vilja villeiðir um søguligar veruleikar. Men vit vita flestøll, at Óli Breckmann fullvæl kennir søguligu gongdina í farnu øld, og at hann við vilja svíkur sín fakliga stoltleika fyri at vinna nøkur bílig politisk point. Tí ger hann tey, sum ynskja frið, til viðhaldsfólk hjá Hitler, Sovjett og Saddam Hussein og verst av øllum til tey, sum eru ímóti kristindóminum.

Í sendingini "Sostatt" førdi Óli Breckmann nøkur sjónarmið fram í kjakinum um eitt møguligt kríggj millum USA og Irak, sum avgjørt mugu rættast og fáast upp á pláss, soleiðis at lurtarin fær røttu myndina og samanhangin av søguligu gongdini.

Hann segði m.a., at hann kendi nógv av fólkunum aftur, sum luttóku í friðargonguni seinasta leygardag. Hetta vóru jú tey somu, sum í 70 og 80´árunum gingu friðargongu til frama fyri Sovjettsamveldinum og kommunismuni, sum hann málbar seg. Men hetta er beinleiðis lygn. Ein friðarrørsla, tá sum nú, hevur einans ein boðskap, og tað er ynskið um frið. Ein friðarrørsla hevur eittans eitt mótmæli, og tað er mótmælið ímóti kríggi. Ein friðarrørsla kann tískil ikki vera fyri einum landi, sum leypur á eitt annað land, ella fyri einari hugsjón, sum kúgar sítt egna fólk. Ger rørslan tað, so er hon snøgt sagt ikki longur ein friðarrørsla.

Javnaðarflokkurin saman við SU vóru millum stigtakararnar til friðarfundin. Og júst sosialdemokratisku flokkarnir runt um í heiminum, og fyrst og fremst her í Norðurlondum, tóku fyri umleið 100 árum síðan greiða frástøðu frá spírandi kommunismuni, og hava gjørt tað alla tíðina síðani. Og hesir somu sosialdemokratar hava verið besta trygdin fyri, at kommunisman ongantíð vann sær fram ikki bert her í Norðurlondum, men eisini aðarstaðir. Sosialdemokratiska hugsjónin byggir alt sítt virksemi á friðarligar loysnir. Ikki bumbur og kanónir, men talaði orðið og samráðingarborð. Tískil hava somu sosialdemokratisku flokkarnir eisini tikið frástøðu frá amerikonsku hersetingini av bæði Korea og Vietnam, tó uttan harvið at vera í parti við kommunistum. Sakin var, tá eins og nú, at virka fyri friði, og at allar ósemjur skulu loysast uttan bumbur.

Kundi eisini hugsað mær at spurt Óla Breckmann, hvørji glæsilig úrslit liggja í slóðini eftir eitt nú Vietnam-krígnum, sum USA forrestin tapti.

Síðan segði Óli Breckmann, at tað var sama friðarrørsla, sum gjørdi, at bølmennið Adolf Hitler ikki varð steðgaður. Hetta er beinleiðis søguleg villleiðing. "Peace in our time", hesi orðini, sum søgumaðurin Óli Breckmann nú legði samlaðu friðarrørsluni í munnin, vórðu stogd av bretska konservativa viðhaldsmanninum hjá Óla Breckmann nevniliga Chamberlain, forsætismálaráðharra.

Og hetta var langt úti. Tí vit vita, at Hitler fyrst og fremst sá sosialdemokratar sum sínar argastu fíggindar. Sosialdemokratar, kommunistar, intellektuell og jødar. Og hann fór ikki fram við mykindum, men so harðliga, at nógvir sosialdemokratar vórðu týndir, um tað ikki eydnaðist teimum at flýggja. Men Óli Breckmann kundi hugsandi svarað uppá, hvussu eitt nú partar av ávísum politiskum flokki í Føroyum í 30´árunum tóku ímóti boðskapinum frá sama Adolf Hitler?

Síðan vildi hann hava okkum øll, sum stóðu á Vaglinum henda leygardagin, at vera í parti við einum øðrum bølmenni, nevniliga Saddam Hussein. Men tað er eingin okkara, sum ynskir Hussein sitandi við valdið, tvørturímóti. Eins lítið, sum vit vóru í parti við Adolf Hitler, hvør av okkum, sum livdu tá, eins lítið eru vit í parti við Hussein.

Men ringasta bakbitið frá Óla Breckmann í hesu somu sending fekk henda friðargongan, tá hann vildi vera við, at vit vóru ímóti kristindóminum. Barnsliga niðurstøða hansara var, at tá vit ikki ynskti kríggj við Saddam Hussein, so var tí, at vit fyri islam og ímóti kristindóminum. Og júst her fór Óli Breckmann nógv stig út um mark. Hetta var reindyrkað populisma og óndsinnað lygn, tá sína ræðiligasta hami. Tað kann væl vera, at Óli Breckmann heldur seg vera frægari kristnan enn flest okkara, men harfrá at siga, at vit eru ímóti kristindóminum, tað er bara ov langt úti av einum leiðandi politikkara at siga - sjálvt um hann eitur Óli Breckmann

Eitt tilmæli er eitt tilmæli - Anfinn Kallsberg

Abraham Mikladal

Nú er løgmaður komin undan dýnuni á Viðareiði og er farin til verka.

Hann tevjar blóð - tjóðveldisblóð. Orsøkin er setanin av landsantikvari.

Við jøvnum millumbilum koma nevndir og stovnar við tilmælum til okkara landsstýrismenn. Hetta eru tilmæli og verða og eiga at verða handfarin, sum tilmæli.

Metir landsstýrismaðurin at tilmælið er rætt og skilagott so fylgir hann tí, annars tekur hann eina aðra støðu.

Sum dømi kunnu nevnast tey fakligu (og helst ópolitisku) tilmælini frá Fiskirannsóknarstovuni o.ø. við. Nær er eitt slíkt tilmæli fylgt.

Nevndarlimir og -formenn hava enntá sagt seg úr starvi, tí teir meta tað ósakligt, politiskt, ófakligt og skaðiligt, at teirra tilmæli ikki eru fylgd av landstýrismonnunum.

Í hesum málinum hava vit havt eina setanarnevnd, ið hevur givið landsstýrismanninum eitt tilmæli. Landsstýrimaðurin var ikki nøgdur við arbeiðið hjá nevndini og gav henni ein møguleika afturat at koma við einum tilmæli, ið var nóg væl undirbygt til at taka støðu útfrá. Men tað fekk hann ikki. Tí tók hann málið í egnar hendur.

Tað hevur hann fulla heimild til. Og hann hevur skyldu til at fylgja síni sannføring og ikki lata seg noyða at fylgja einum tilmæli, sum hann ikki metir vera nóg væl grundgivið.

Finnbogi Arge fylgdi ikki tilmælinum frá setanarnevndini tá Oyvindur Brimnes bleiv settur sum Landsverkfrøðingur, Bjarni Djurholm fylgdi ikki tilmælinum, tá nevndin í Framtaksgrunninum varð vald, Helena Dam á Neystabø fylgdi ikki tilmælinum frá setanarnevndini tá kommunulæknin Turið Petersen var sett í Suðurstreymi, Høgni Hoydal fylgdi ikki tilmælinum frá setanarnevndini tá Rúni Joensen var settur, sum aðalstjóra í Løgmálaráðnum.

Og legg til merkis, hetta fekk ongar avleiðingar. Og ongar kanningar vóru settar í verk.

Løgmaður vil hava hevnd fyri Jørgin!

Tað kann hann til einhvørja tíð fáa. Hann hevur heimild at siga ein landsstýrismann úr starvi, tá tað passar honum. Legg til merkis: TÁ TAÐ PASSAR HONUM, og hetta málið sær út til at PASSA honum.

So hann er komin ta longu leið undan síni fjálgu dýnu á Viðareiði til at verða formaður í drápinum av einum landsstýrismanni, og sjálvandi vil hann hava at drápið skal ganga skjótt fyri seg. Nú fáa vit at síggja, um hann heldur landsstýrismannin til ella letur hann sleppa.

Rættleiðing frá Náttarravnunum

Nevndin fyri Náttarravnarnar í Tórshavnar kommunu

Eitt tíðindaskriv um dans í Badmintonhøllini hevur verið í fjølmiðlunum seinastu dagarnar. Hvør sum hevur skrivað og sent tíðindaskrivið framgongur ikki, men við at spyrja okkum fyri, hava vit fingið at vita at tað er fyritøkunan DJ-Show, sum er dansifyriskipari í Badmintonhøllini, ið er avsendari.

Av tí at Náttarravnarnir vera nevndir í skrivinum á ein hátt, sum kann misfatast, vilja vit gera hesa rættleiðing.

Greitt verður frá, at dansur fyri tey ungu millum 14 og 18 ár nú aftur verður til kl. 3:30, og at ávísar broytingar verða viðvíkjandi vaktarhaldi uttanfyri høllina.

Sagt verður, at hetta verður gjørt í samstarvi við Náttarravnarnar, og at endamálið er at fyribyrgja ófrið hjá grannunum.

Lesarin kann fáa ta fatan, at Nátarravnarnir onkursvegna hava verið við í málsviðgerðini, sum er endað við, at fyriskipararnir av dansi í Badmintonhøllini nú aftur sleppa at hava dans til kl 3:30, og at Náttarravnarnir eru í onkrum slagi av samstarvi um vaktarhald uttanfyri dansihøllina.

Vit vilja við hesum siga frá, at vit als einki hava við dansiloyvir ella vaktarhald at gera. Vit eru ikki umboð fyri nakað privat felag, býráðið ella nakran annan myndugleika. Um vit umboða nakran, so eru tað foreldrini.

Vit eru ein felagskapur av sjálvbodnum vaksnum, sum vilja vera í náttarlívinum, á ein skipaðan hátt, fyri at økja um tryggleikan hjá teimum ungu. Vit hava sum so ikki viðgjørt spurningin, men flestu limir okkara halda óivað, at tað er alt ov seint at enda dansin kl. 3:30 fyri 14 ára gomul. Vit harmast um at tað, av figgjarligum orsøkum, ikki skal bera til at enda dansin fyrr.

Henda rættleiðing skal ikki skiljast so, at vit ikki ynskja samstarv um viðurskiftini hjá teimum ungu í náttarlívinum. Vit høvdi fegin luttikið, um møttust fyri at tosa um, hvussu tey ungu kundu fingið betur og tryggari umstøður.

Rætting

Í sambandi við grein okkara í gjár um dans í Gundadalshøllini er onkur misskiljing íkomin. Jan Christiansen, borgarstjóri sigur, at herfyri hevði hann fund við grannar um dansin í Badmintonhøllini. Tá varð so avgjørt saman við løgregluni at enda dansin klokkan 2. Men tað vísti seg, at hetta gekk ikki. Fyrireikarnari mettu ikki, at hetta bar til. Síðani varð tosað aftur um málið og varð avgjørt sum eina roynd 3. hvørja viku til í heyst at hava dans tvs. DJ-show til klokkan 3.30.

Blaðm.